## DAGSINS MEINING

# Talu- og skrivifrælsi

Seinstu tíðina hava vit her í Føroyum upplivað eitt orðskifti um viðurskiftini hjá teimum samkyndu í samfelagnum. Hetta orðaskiftið snýr seg um mong ymisk viðurskifti av týdningi fyri trivnað og fyri fólkaræði. Men uttan mun til evnið, so snýr hetta orðaskiftið seg eisini um talu- og skrivifrælsið í Føroyum. Sum kunnugt er talu- og skrivifrælsið ikki ein rættur, sum vit altíð hava havt. Hesin rættur varð á fyrsta sinni um okkara leiðir staðfestur við donsku grundlógini frá 1849. Fyri hetta var einki, sum æt skrivi- og talufrælsi. Skrivi- op talufrælsi er ein tann mest grundleggjandi fortreytin fyri einumhvørjum fólkaræði. Orðaskifti og rætturin til at hava aðrar meiningar enn statsvaldið er ein týðandi partur av fólkaræðinum, og tí hevur skriv- og talufrælsið so stóran týdning fyri eina fólkaræðiliga samfelagsskipan. Vit síggja hetta so týðuliga, tað ið einaræðisharrar taka valdið í einum fólkaræði. Tað fyrsta frælsið, ið verður køvt, tá ið diktatorar taka yvir, er talu- og skrivifrælsið. Okkara tíð hevur sæð hetta henda í eitt nú Chile, Argentina og Grikkalandi. Vit hava framvegis ikki talu- og skrivifrælsi í stórum partum av heiminum – óneyðugt er at nevna dømi.

Av innlýsandi orsøkum er tað umráðandi at umsita talu- og skrivifrælsið væl og skynsamliga. Hetta er ein orsøkin til, at talu- og skrivifrælsið verður útinnt undir ábyrgd fyri revsilógini. Tú kanst skriva og siga næstan alt, men tú mást eftirfylgjandi standa til svars fyri tínum orðum. Nøkur orð eru so niðrandi, at tað er bannað at nýta tey, eins og tað ikki er loyvt at niðurgera ávísar samfelagsbólkar ella at almannakunngera blasfemiskar ákoðanir. Í Føroyum verður talu- og skrivifrælsið troytt til fulnar. Tað kunnu vit væl skjótt semjast um. Orðaskiftið er ofta hvast og lítið semiligt. Hetta er serstakliga galdandi millum andstøðu- og samgonguflokkar ella politikkarar og tá vit skifta orð um siðalig, átrúnaðarlig ella kenslulig evni. Tónin, orðalag og orðaval eru avgerandi fyri eitt gott orðaskifti. Onkur tinglimur hevur mælt til, at vit skulu tosa siðiliga og vinarliga við hvønn annan. Hetta eru sera góð ráð, ið øll áttu at umhugsa.

Orðaskifti er neyðugt, gagnligt og fremjandi fyri fólkaræðið. Men tað er neyðugt av fyriliti fyri sama fólkaræði, at øll vanda sær um tónan og orðalagið. Ein harður og ósemiligur tóni fremur ikki fatan og tollyndi. Tann harðligi tóni, ið eyðkennir samskiftið millum t.d. andstøðu og samgongu økir ikki um virðingina fyri politisku skipanini. Tað ógvusliga orðalagið millum teirra, sum umrøða støðuna hjá samkyndum, gagnar hvørki teimum samkyndu ella fólkaræðinum. Fólkaræðið byggir á sínamillum virðing – á virðingina fyri tí veruleika, at vit kunnu ikki øll vera samd og at vit heldur ikki øll eiga at vera samd. Fólkaræði merkir m.a. margfeldni í áskoðanum. At viðurkenna hetta er samstundis at viðurkenna, at vit øll mugu fara við hvørjum øðrum við virðing og respekt. Vit skulu øll vera her, og tað er ikki neyðturviliga so, at tey, ið rópa harðast, altíð hava rætt. Men hinvegin er orðaskifti og skifti av meiningum ein neyðturvilig fortreyt fyri fólkaræðinum, ið treytaleyst er tann besta samfelagskipan, sum nakrantíð hevur verið til. Tí eiga vit sum sagt at vanda okkum um tónan í almenna orðaskiftinum, alt meðan vit sjálvandi eiga at halda fram við orðaskiftinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skulu vit lóggevast til kleysturlív?



**SÚSANNA DAM**
Bankakvinna

**– Tað er ræðandi, um fólk verða lokkað at halda, at vit kunnu lóggeva okkum burtur úr gerandisdegnum og teimum evnum, sum skaparin gav, heldur Súsanna Dam**

Katólska kirkjan bjóðar fólki, sum vilja sleppa undan gerandis órógv og stríði møguleika til at fara í kleystur. Í mínum hugaheimi ein sera áhugaverd tilvera, hóast eg veit, at hetta lívið ikki er hóskandi fyri meg og allarahelst ikki fyri meirlutan av mannaættini. Áðrenn ein sleppur í katólskt kleystur, skal ein vera tilkomin og skal lúka eina áralanga læru – royndartíð. Skuldi ein, hóast sjálvboðin og eftir lokna royndartíð, ikki verið førur fyri at tillagað seg til ta avbyrging og tann sakn, sum kleysturlívið krevur, hevur ein eisini møguleiki fyri at sleppa leysur aftur.

Spell at luteranarar ikki hava tikið kleystursiðin við sær, tí av tí vitleysa religiónskjakinum sum fer fram her á landi sæst tíðiliga, at her eru fólk (kanska enntá stórur partur av fólkinum), sum í staðin fyri valfrælsi, ætlar at lóggeva okkum øll til eina kleysturtilveru. Her er einki krav um, at fólk skulu vera tilkomin og myndug ella sannførd um, at hendan tilveran er hin rætta. Her skal heldur eingin royndartíð vera. Flongd við Bíbilini eru vit ávegis aftur í einveldið. Hitt óupplýsta.

Agnið er bara eitt lyfti frá sjálvkravdum profetum um eina æviga sælu, og álvaratos, í mínum hugaheimi er hesin »profetaskari« einki annað enn maktgreðingar, sum lova okkum avlát ímóti at vit ganga undir teirra treytir.

Øll minnast helst vallyftið frá Jenis av Rana, um at bara hann fekk maktina, so skuldu øll fáa tað so gott, ja hann skuldi gera alt so gott, at hann ikki átti orð til at greiða nærri frá, men treytin er altso, at vit avnokta okkara egnu tilvitsku og laga okkum til hansara lóg. Eina lóg, sum hann og hansara líkar í teirra fákunnu hava flikkað saman úr nágreiniliga tilætlaðum brotum úr Bíblini.

Av og á frættist um tey ræðuligastu lógarbrot av øllum handa slagi, sum eru framd innan avbyrgdar kleysturmúrar. Hetta tí at nøkur ikki hava megnað at tamt tær tráðanir, sum hvør einstakur okkara hevur fingið til at umsita eftir hvør sínum evnum og vilja. Púra vist er tað ræðandi, um stórur partur av føroyingunum er lokkaður til at halda, at her á landi kann mann bara lóggeva seg burturúr gerandisdegnum og teimum evnum sum Skaparin gav.

*damsusanna@hotmail.com*

# Orðloysingurin Heðin Mortensen



**HØGNI MIKKELSEN**
Býráðslimur fyri sambandsflokkin

**Tað at sannleikin sjáldan er væl lýddur, kunnu vit lesa í greinini við yvirskriftini: »Øvundsjúka luktar eisini«, sum orðloysingurin Heðin Mortensen hevur skrivað**

Orðloysingurin skrivar, at tað er honum fyri at takka, at Sambandsflokkurin fekk trý umboð í Býráðið til valið seinast. Tað at hann skrivar slíkt, vísir hvussu stórur egoistur hesin orðloysingurin er. Sjálvur haldi eg, at vit kunnu takka øllum valevnunum á Sambandslistanum og ikki minst veljarunum fyri at vit fingu trý umboð vald. Øll valevnini á Sambandslistanum eiga eina tøkk uppiborna og hava æruna av at okkara flokkur fekk tríggjar býráðslimir. Hesum skal orðloysingurin Heðin Mortensen ikki einsamallur taka sær æruna av.

Orðloysingurin skrivar eisini: »Einki hevur Heðin Mortensen vent nøkrum bakið«. Álvaratos Heðin, tá tú hevur skrivað undir eina avtalu og ikki heldur hana, so ert tú ein orðloysingur. Um tú ikki heldur teg vera ein orðloysing, so eigur tú at stevna meg fyri ærumeiðing, tí um tú letur meg kalla teg slíkt niðursetandi, og ikki letur við teg koma, tá ert tú veruliga ein lítil maður.

Tað hevur verið skrivað í onkrari blaðgrein, at borgmeistarasessurin verður skiftur út í hesum valskeiðnum, men eg ivist um so verður. Heðin Mortensen er so glaður fyri at hava tilrænt sær borgmeistarasessin, at hann eisini gleðiliga loypir frá avtaluni um borgmeistaraskiftið við Jógvan Arge, tá tann tíðin kemur.

*hogni@torshavn.fo*

# Súrlig málrøkt: Agurka, ikki agurk!!



**EYÐUN Á BORG**
Lærari

**Ikki: fersken/fersknir, appelsin og citrón. Men: ferska/ferskur, appilsin og sitrón!!**

Agurka: Løgið, at næstan øll hava vent agurkuni bakið og eru farin at siga agurk!?

Sambært móðurmálsorðabókini og tí, eg sjálvur eri vanur við, eitur tað ein agurka (veikt bent, tann lættara bendingin)!!

Orðið bendist: agurkan, agurkuna, agurkuni og fleiri agurkur!

Skal tað broytast til agurk (sterkt bent), bendist orðið: agurkin, agurkina, agurkini og fleiri agurkir (ki verður jú úttalað tji)!!

Ferska: Ein ferska, fleiri ferskur! Stutt og greitt! Veikt bent , sum agurkan! Fersken/fersknir er ikki føroyskt!

Appilsin: Appelsin er útlendsk staving!

Sitrón: Ikki citrón, tí c er ikki í føroyska bókstavaraðnum!

Her kann skoytast uppí, at onkur hevur havt einar tvær súrar stavivillur í heilt nógv ár!?!

Við súrari málkvøðu!

*eydun.a.borg@skulin.fo*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.